# Kunnu læra av hvørjum øðrum

**Føroyingar hava framúr skattaskipan, meðan íslendingar eru komnir longri við tollavgreiðsluni. Tí kunnu vit læra nakað av hvørjum, hildu Karsten Hansen og Geir Haarde eftir fund í Klaksvík týsdagin**



*– Tá vit hugsa um, hvussu vánalig støðan var í 90'unum, er tað mest at líkna við eitt undur, at Føroyar eru komnar so væl fyri seg aftur, heldur íslendski fíggjarmálaráðharrin, Geir Haarde, sum fundaðist við Karsten Hansen í Klaksvík týsdagin. Mynd: Eyðun Klakstein*

BÚSKAPUR

*Eyðun Klakstein*

Karsten Hansen, landsstýrismaður við fíggjarmálum, og Geir Haarde, íslendskur fíggjarmálaráðharri, tosaðu týsdagin um, hvussu Føroyar og Ísland í framtíðini kunnu samstarva á búskaparliga økinum.

Fundurin millum teir varð hildin í býráðshúsinum í Klaksvík, har teir báðir eisini høvdu tíðindafund.

Karsten Hansen og Geir Haarde kunnaðu hvør annan um ymisk viðurskifti, og báðir løgdu upp til meiri samstarv, tá teir gjørdu viðmerkingar eftir fundin.

– Tað er umráðandi fyri okkum, at vit fáa eitt gott og breitt samband við útheimin. Vit plagdu at hava nógv samstarv við íslendingar, men seinnu árini hevur sambandið kanska ikki verið so nógv sum fyrr. Nú vit eru komin meira við í norðurlendska samstarvið, er tað upplagt við øktum samstarvi við íslendingar, segði Karsten Hansen.

Geir Haarde bjóðaði føroyingum hjálp og ráðgeving, um føroyingar hava brúk fyri tí í búskaparligum viðurskiftum.

## Eitt føroyskt undur

Íslendski fíggjarmálaráðharrin var ovfarin av, hvussu væl føroyska samfelagið er komið fyri seg eftir sváru kreppuna í nítiárunum.

– Tá vit hugsa um, hvussu vánalig støðan var í 90'unum, er tað mest at líkna við eitt undur, at Føroyar eru komnar so væl fyri seg aftur, segði Geir Haarde.

– Og nú liggur kanska ein avbjóðandi oljuvinna fyri framman. Hetta eru veruliga ævintýrligar tíðir fyri føroyingar, segði íslendski ráðharrin, sum hevði góðan hug at tosa um olju.

Geir Haarde hevur áður vitjað í Føroyum, og á tíðindafundinum helt hann fyri, at tað var gott at verða í Klaksvík, tí fyri 17 árum síðani fekk hann smakkin fyri Føroya Bjór, so tað var hugaligt verða í heimbýnum hjá bryggjarínum.

## Læra av tollskipan

Tað er líkt til, at íslendingar og føroyingar kunnu hjálpa hvørjum øðrum á onkrum økjum.

Íslendski ráðharrin var imponeraður av føroysku skattaskipanini, sum føroyski landsstýrismaðurin heldur ikki helt seg aftur at rósa.

– Eg kendi lítið til føroysku skattaskipanina, men eg má siga, at tykkara A-skattaskipan er genial, og har er ivaleyst nakað, sum vit kunnu læra av tykkum, helt Geir Haarde.

Karsten Hansen vísti á tollavgreiðsluna sum eitt ítøkiligt mál, har føroyingar kunnu fáa brúk fyri íslendskari ráðgeving.

– Íslendingar eru komnir nógv longri enn vit við tollautomatisering. Vit skulu hava okkara skipan at rigga innan eitt ár, og har kunnu vit fáa brúk fyri íslendskari hjálp. Íslendingar hava eina góða skipan, og teir hava eisini verið dugnaligir til at greiða fólki frá skipanini, so hon riggar til fulnar, segði Karsten Hansen.

Eftir fundin í Klaksvík fór ferðalagið til Viðareiðis og síðani til Mikladals, har tey skuldu gista mikunáttina.

# Óhugsandi at selja JFK

**Tað kann ikki koma uppá tal at privatisera Føroyagrunnin, sum eigur JFK í Klaksvík, heldur landsstýrismaðurin við fíggjarmálum**

PRIVATISERING

*Eyðun Klakstein*

**Klaksvík:** Privatiseringar vóru eitt av evnunum, tá Karsten Hansen og íslendski starvsfelagi hansara, Geir Haarde, fundaðust í Klaksvík týsdagin.

Á tíðindafundinum aftaná vóru møguligar privatiseringar eisini havdar á lofti, men Karsten Hansen helt, at tað er ikki alt, sum er egnað at privatisera, og tá talan var um Føroyagrunnin, var Karsten Hansen avgjørdur.

– Eg meti tað verða púra óhugsandi at selja Føroyagrunnin til privatar íleggjarar. Virksemið hjá JFK er lívsæðrin í Klaksvík, og verður Føroyagrunnurin privatiseraður, er vandin stórur fyri, at skip verða flutt úr býnum, segði Karsten Hansen.

– Tá kreppan rakti landið í 90'unum, tóku fólk í



*– Virksemið hjá JFK er lívsæðrin í Klaksvík, og verður Føroyagrunnurin privatiseraður, er vandin stórur fyri, at skip verða flutt úr býnum,s heldur Karsten Hansen, landsstýrismaður við fíggjarmálum.*

Mynd: Eyðun Klakstein

Klaksvík seg saman fyri at halda virki og skip í Klaksvík. Tí hevði tað verið ørskapur at farið at eksperimentera við at privatisera Føroyagrunnin, heldur Karsten Hansen.

Føroyagrunnurin eigur JFK, sum hevur nógv virksemi í og úr Klaksvík. JFK eigur millum annað Kósavirkið, Næraberg og Sundaberg.

# Óført summartiltak í Mikladali

**Mikladals sóknar fráhaldsfelag hevði leygardagin sítt árliga stóra summartiltak til frama fyri felagshúsinum har**



*Undirtøkan var stór, tá Mikladals sóknar fráhaldsfelag skipaði fyri tiltøkum í Mikladali farna vikuskiftið.*

Mynd: Símun Dahl

Leygardagin varð flag lagt á heili tvey hús í Mikladali. Men hetta var heldur ikki tað einasta, sum varð á skránni henda dagin. Á hvørjum ári skipar Mikladals sóknar Fráhaldsfelag fyri tiltøkum til frama fyri felagshúsinum í Mikladali.

Felagið varð stovnað í 1883 og telir um 200 limir kring landið.

Fríggjakvøldið byrjaði alt spakuliga við cafeteria og hugna. Nógv fólk varð komið norður. Ljós í hvørjum húsi. Ein rúgva av børnum, sum hugnaðu sær óført millum húsini í bygdini. Dýrdarveður, men mjørki. Tíverri fyri tey, sum minntust seinasta ár, har ein kundi síggja sólina - í klárastu líkindum - rísa upp úr havsbrúnni mitt millum Kalsoynna og Kunoynna fríggjanáttina.

Leygardagin klokkan hálvgum tvey varð ferð sett á við kondibingo. Orsaka av mjørka vóru postarnir hesuferð lagdir við vegin kring Mikladal, men vanliga liggja teir gjøgnum hagan á veg niðan á Háls — vestantil á oynni, har ein sær yvir á Eysturoynna. Har uppi plaga luttakarnir at hugna sær við ymsum barnaspølum.

Um trý-tíðina lat tombola upp í Norðnástovu og bóltkast og fiskibrunnur á torginum við Innistovu. Á torginum høvdu menn sett upp stóran dúk, sum fevndi um alt torgið við perum rundanum, so tað líktist rættuliga tí, sum vit síggja á summarstevnum kring landið. Og børnini stuttleikaðu sær óført.

## Hillarnar tømdar

Nakað seinni komu pylsur og grill afturat á torgið. So nú stóð onki annað mát við hetta. Sólin hevði nú upployst tann tætta mjørkan og fylti dalin við sínum bjørtu strálum og vísti okkum tey høgu fjøllini aftur og tann bláa himmal. So tey, sum høvdu saknað hagatúrini fyrr á degnum, nýttu høvið nú. Børnini høvdu ilt við at velja millum 'tivoli' og annað spæl kring húsini og í ánni. Men hugnin varð óførur.

Um hálvgum sjey-tíðina byrjaði stóra eyðnuhjólið í kjallaranum í Innistovu við cafeteria í erva. Veðrið var enn av fagrasta slagi, so tað var eitt sindur tungt at tuga fólk innum. Men skjótt kom ferð á, og tá klokkan varð farin av ellivu, vóru hillarnar tómar. Og so vóru teir vanligu lutaseðlarnir tiknir.

Á miðnátt endaði alt tiltakið við tjóðsanginum. Inn vóru komnar brutto góðar 60.000 kr. til fráhaldshúsið og ta søk, sum tann fyribyrgjandi parturin í fráhaldssakini stendur fyri. Eini hundrað børn og ung hugnaðu sær saman í einum tiltaki, sum minnir tey á, at ein kann hugna sær uttan rúsdrekka og umganga tær fylgjur, sum mong uppliva av hesum.

Hálvan tíma seinri varð fyrsti bussurin á veg við fólki til Syðradal og ein tíma seinri hevði Alpha Pilot ført tey til Klaksvíkar. Men tann størra rúgvan bíðaði til sunnudagin.